

# FRÍTÍÐAR- OG ÍTRÓTTAPOLITIKKUR

Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU
2020-2024



**„Okkara høvuðsstaður skal vera virkin og vakin; at vera ein vakstrardepil í Norðuratlantshavi, umframt at vera alheimsgjørdur og fjølbroyttur og ikki minst at høvuðsstaðurin er livandi við upplivingum og avbjóðingum, men eisini við trygdleika og nærleika.“**



# INNGANGUR

Frítíðar- og ítróttavirksemi hevur stóran týdning fyri einstaklingin, bólkar, felagsskapir og samfelagið alt. Tórshavnar kommuna vil styðja undir framhaldandi menning, har ljós verður varpað á umstøður og ágóðar av hesum, og vil somuleiðis tryggja góðar upplivingar, trivna og heilsufremjan fyri okkara borgarar við at stimbra átøk ella skipanir, ið kunnu menna virksemi innan ítrótt og frítíð.

Frítíðar- og ítróttapolitikkurin er eitt yvirskipað boð uppá, hvussu økið framyvir skal umsitast og mennast. Støða verður ikki beinleiðis tikin til endurskoðaðar stuðulsskipanir. Ítøkiligar arbeiðsætlanir verða gjørdar til hetta samsvarandi endamálinum við frítíðar- og ítróttapolitikkinum. Politikkurin, ella partar av honum, verður endurskoðaður við nøkrum ára millumbili.

Við einum politikki innan frítíð og ítrótt verður fokus sett á virknar borgarar og sosialar felagsskapir. Frítíðar- og ítróttavirksemi verður í politikkinum skilt sum skipaður felagsskapur eins væl og sjálvskipað virksemi.

Økið er sermerkt við nógvum sjálvbodnum arbeiði, og politikkurin hevur tí tikið skap í samskifti við viðkomandi partar og felagsskapir á økinum. Høvuðsboðskapurin við einum slíkum politikki er, at øll, ið búgva í Tórshavnar kommunu, skulu hava møguleika at luttaka í onkrum virksemi ella felagsskapi, og at eitt nú børn og ung hava góðar virkisumstøður á tí stigi, ið hóskar til teirra.

Kommunan vil vísa á, at góðir karmar verða veittir til dygdargott virksemi og samstundis vísa á, hvørji tilboð ella hvørjir málbólkar eiga at fáa betri rúmd í frítíðar- og ítróttarvirksemi.

Ein grundleggjandi boðskapur er ST heimsmál nr. 3 um góða heilsu og vælveru – at tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri. Politikkurin hevur trý høvuðsendamál, ið verða undirbygd við settum málum og lýst við viðkomandi evnum í teimum komandi trimum pørtunum.

# GÓÐ HEILSA FYRI ØLL

Kommunan vil stimbra og stuðla undir skipað og sjálvskipað frítíðarvirksemi til frama fyri sálarliga og kropsliga heilsu. Allir borgarar skulu hava umstøður at vera virknir.



1. Framhaldandi veita **karmar og umstøður**, ið **tryggja** feløgum, felagsskapum og borgarum at vera virkin – saman og hvør sær. Sjálvskipaðir **bólkar av borgarum** eiga at hava møguleika at keypa ein rørslutíma t.d. til fótbólt, hockey, o.a.

2. Hava fokus á málbólkar, ið vanliga ikki fáa so **nógva rúmd** í ítróttafeløgum og inni í hallunum. Hetta kann kommunan stimbra í samstarvi við feløg og felagsskapir. Pláss eigur at vera fyri, at øll hava **javnbjóðis** møguleikar – bæði børn, ung, vaksin, familjur, eldri og tey við skerdum førleikum.

3. Varpa ljós á tey tiltøk og tilboð, har tey við **skerdum førleika** hava møguleika at luttaka. Í sambandi við viðlíkahald og nýbygging av **almennum bygningum** verður hædd tikin fyri atkomuviðurskiftum hjá teimum, ið hava rørslutarn.

4. Gera eina meting viðvíkjandi skúla- og stovnsøkinum við denti á, hvussu hesi eiga at verða **skipað og gagnnýtt** til rørslu og spæl. Eitt tættari samband ella **samstarv** eigur at mennast millum fakligt frítíðar- og ítróttavirksemi og kommunala stovnsøkið.

5. Menna eitt miðlingaramboð um møguleikar innan **frítíðar- og ítróttavirksemi**. Ein síða verður gjørd, har møguleiki er at miðla breitt um tey lokalu frítíðar- og ítróttatilboðini. Samstundis eiga frítíðarfelagsskapir og ítróttafeløg at **kunna breitt og ítøkiliga** um síni tilboð á heimasíðum og øðrum viðkomandi miðlum.




# ST HEIMSMÁL UM GÓÐA HEILSU OG VÆLVERU

ST heimsmál um góða heilsu og vælveru er ein av grundleggjandi boðskapunum í endamálinum við frítíðar- og ítróttapolitikkinum. Endamálið við politikkinum er somuleiðis at tryggja, at okkara borgarar hava **góðar umstøður** at vera virknir, at vera saman og at vera hugbundnir, samsvarandi verkætlanini ABC fyri **sálarliga** heilsu. Kropslig og sálarlig heilsufremjan kann m.a. vera **luttøka** í felagsskapi við aðrar borgarar, og tað er m.a. gleðin av at læra og mennast í einum sosialum umhvørvi, sum serliga fær ung at halda fram at íðka og taka lut. Børn eiga ikki at kenna seg trýst til at gera nakað, tey ikki vilja – hetta kann vera ein orsøk til, at stórur partur av íðkarum gevst. Sálarlig heilsufremjan er fyri øll menniskju, uttan mun til, um ein hevur sálarliga sjúku ella ikki (Heildarætlan fyri sálarliga heilsu, 2018). Ítróttar- og frítíðarvirksemi verður sæð sum loysnin á nógvum av heilsuligu og sosialu avbjóðingunum í dagsins samfelagi.

# LUTTØKA Í VIRKSEMI, SUM IKKI ER SKIPAÐ

Tað eru fleiri, ið ikki luttaka í skipaðum tilboðum. **Hentleikar** hjá kommununi, ið eru til avlops, so sum í ítróttarhallum, kunnu nýtast til ein virknan og sosialan **gerandisdag** hjá borgarum í øllum aldri. Hóast umstøðurnar í hallunum kunnu tykjast trongar, so eru tíðir á degnum, tá hallirnar verða lítið brúktar. Talan er serliga um tíðir tíðliga á degnum. Tað skal vera lættari fyri bólkar, ið sjálvir ynskja at skipa seg innan rørslu og spæl, at sleppa fram at tøkum tímum – og sjálvir hava **ábyrgd av** nýtslu, rudding o.a. Til endamálið er heimasíðan itrott.fo **dagførd** og gjørd meira brúkaravinarlig í sambandi við nýtslu og bílegging av kommunalum hallum.

Tað skal framhaldandi vera pláss fyri teimum, ið eru skipað innan frítíð og ítrótt. Feløg og felagsskapir eiga eisini at stremba eftir at veita tilboð til ein breiðari málbólk – við tí fyri eyga, at ávísir og meira **fjølbroyttir bólkar av borgarum** taka lut í virkseminum.





# VIRKIN SAMAN – SUM FAMILJA, TVØRTUR UM ÆTTARLIÐ

Tórshavnar kommuna vil stimbra, at tilboð verða veitt, ið venda sær til **allar samfelagsbólkar**. Hetta kann vera bæði í náttúruni, á spæliplássum ella inni í hallum, felagshølum, skúlum osfr. Eftirspurningurin eftir einum meira **fjølbroyttum** og samanhangandi virknum lívi merkist, og tað hevur týdning fyri familjur at vera virkin saman. Kvøldskúlaskipanin hevur tilboð, sum eru ætlað tveimum ættarliðum, t.d. innan matgerð og onnur skapandi evni. Virknishøllin í Finsen fer m.a. at vera karmur um barnaspæl og sosiala samveru og er eitt boð uppá karmar til familjur at fáa ágóðan av. Virknishøllin í **Finsen** er ætlað einum breiðum hópi av borgarum at leiga til ymisk endamál innan rørslu og **sosiala samveru**. Ætlanin er, at høllin burturav verður til nýtslu hjá borgarum og ikki hjá ítrottarfeløgum.

Kommunan veitir karmar og umstøður til onnur at virka í og vil við hesum **eggja** feløgum og felagsskapum til at skapa eitt umhvørvi, har familjur ella foreldur og børn eru virkin saman ella tvørtur um ættarlið – antin saman ella við ymiskum virksemi somu tíð og sama stað. Feløg og felagsskapir eiga at leggja seg eftir eisini at skipa fyri tilboðum fyri vaksin ella fyri familjur. Talan kann somuleiðis vera um **„Kom í gongd átøk“** fyri borgarar í øllum aldri – serliga vaksin ella eldri, ið ikki hava gingið til frítíðarvirksemi ella íðkað ítrótt áður.





# TÓRSHAVNAR KOMMUNA – EIN ELDRAVINALIGUR BÝUR

Dentur verður lagdur á, at umstøðurnar í høvuðsstaðnum stuðla undir at geva eldri fólki møguleika at vera **virkin og vakin** – alt lívið, og møguleikan at gagnnýta og menna teir førleikar, tey hava.

Seinastu árini hevur verið arbeitt miðvíst við at gera gøtuskipanir, har øll hava møguleika at ganga túrar **í náttúruvøkrum og friðaligum** umhvørvi. Beinkir eru settir upp við passaligari fjarstøðu, soleiðis at til ber at hvíla seg inn í millum. Innan **heilsu- og umsorganarøkið** í Tórshavnar kommunu verður skipað fyri heilsufremjandi tilboðum, eins og fleiri tilboð innan rørslu og annað eru skipað fyri eldri. Eldri kunnu svimja í Svimjihøllini í Gundadali við **pensjónistavsláttri**, og borgarar, sum eru eldri enn 75 ár, fáa tilboð um vitjan av heilsuráðgevum, har endamálið er at fáa eitt prát og at kunna um tilboðini, sum eru í kommununi innan mentan, ítrótt og **sjálvboðið ítriv**. Eggjað verður til, at feløg og felagsskapir skipa tilboð innan ítrótt til eldri. Fyrrapartstímar í ítróttarhallunum eru í ávísan mun tøkir, og hetta er eitt sjálvsagt høvi hjá pensjónistum at **vera virkin** saman. Samstundis er tað av týdningi, at tilboð til eldri ikki burturav eru til eldri, men at møguleiki er fyri at vera saman tvørtur um ættarlið. Hetta **er galdandi**, bæði tá ein býr heima í egnum heimi, og eisini tá ein møguliga flytur á eldrabústovn.

# JAVNBJÓÐIS MØGULEIKAR – INKLUSIÓN OG JAVNSTØÐA

Eitt breitt og fjølbroytt útboð av frítíðarhentleikum skal tryggjast til allar borgarar – eisini tey við serligum tørvi ella skerdum førleika. Ljós eigur at verða varpað á tey **tiltøk og tilboð**, har tey við **skerdum førleika** hava møguleika at luttaka. Í sambandi við nýbygging og viðlíkahald av bygningum eigur at verða arbeitt við at menna umstøður og atkomuviðurskifti hjá teimum við rørslutarni. **Virknishøllin í Finsen** er eitt boð uppá umstøður, ið eisini eru væl egnaðar sum karmur um virksemi til tey við skerdum førleika og rørslutarni. Kvøldskúlaskipanin **samstarvar** við Parasport um tilboð til tey við skerdum førleikum.



# UMSTØÐUR TIL RØRSLU Á KOMMUNALUM STOVNUM

Kommunan eigur at samstarva við feløg og felagsskapir við at seta ávís **frítíðar- og rørsutilboð** í verk á stovns- og skúlaøkinum, harundir eisini at virka fyri góðari integratión av tilflytarabørnum. Ítøkiliga endamálið er at vera virkin, vera saman, at fremja heilsu og rørslu, samstundis sum børn og **ung fáa kunnleika** um tey ymisku feløgini og felagsskapirnar, ið eru. Í barnagørðum og skúlum, umframt í øðrum kommunalum stovnum, eldrabústovnum og búeindum, **eigur nærumhvørvið**, bæði inni og úti, í størri mun at verða skipað og nýtt til **rørslu**, **motorikk og spæl**. Skúlar, dagstovnar og aðrir stovnar og búeindir skulu eggjast til at vera virkin **sum ein natúrligur partur** av gerandisdegnum.





# UNGDÓMSMENNING

Tað vísir seg at vera ein avbjóðing **at halda tey ungu til ítróttin**, tá tey eru komin í ein ávísan aldur – tá tey ikki ynskja eina eins seriøsa venjing, sum tað krevur at vera í úrvalsformi. Avbjóðingin verður fráfall í luttøku. Frítíðarfelagsskapir uttan fyri ítróttin merkja somuleiðis líknandi fráfall. Tað er týdningarmikið, at børn og ung fara uppí og verða hildin til í einum virknum sosialum felagsskapi – har tey kunnu kenna samanhald, stuttleika og **persónliga menning**. Stuttleikin og samanhaldið hava stóran týdning fyri íðkarar og luttakarar, bæði fyri tann, ið ynskir at taka lut av og á, og tann, ið ynskir at vera meira virkin – tí eigur pláss at vera fyri báðum. Til hetta kann hugsast, at barna- og **ungdómstilboð** eiga at vera meira fleksibul. Ávísir bólkar eiga at verða styrktir, m.a. við at feløg og sersambond stimbra eitt umhvørvi við talentmenning, samstarva um møguleikar fyri skeiðum og útbúgvingum til venjarar og at karmar verða veittir, ið lúka altjóða treytir.

# MIÐLAN AV TILBOÐUM

Miðling av møguleikum hjá borgarum fyri einum **virknum** ítrótta- og frítíðarlívi skal fremjast og mennast, bæði í skipaðum og sjálvskipaðum virksemi, kvøldskúla o.s.fr. Hetta verður gjørt við at menna talgilda pallin hjá kommununi. Í sambandi við kommunuætlanina verður ætlandi arbeitt við eini síðu, ið m.a. skal savna alla **kunning** um frítíðar- og mentanarlív, har kort yvir lendisgøtur/gøtuskipanir eisini verður gjørt. Síðan fer at gera tað lættari og **meira sjónligt** hjá borgarum og brúkarum at síggja, hvørji **tilboð og umstøður** annars eru í kommununi.



# KARMAR OG HENTLEIKAR

Dygd og menning innan karmar og hentleikar hjá Tórshavnar kommunu til frama fyri borgarar og felagsskapir, uttan mun til aldur, støði og førleikar.



1. Í so stóran mun sum til ber rúma **breidd og rørsluvenjing**, skipað og sjálvskipað, í teimum kørmum, sum kommunan veitir. Møguleikar og hentleikar til rørslu og trivnað í **býarrúminum og náttúruøkjum** eru partar av hesum.

2. Kommunan ynskir skilagóða nýtslu av teimum kørmum, ið eru, havandi í huga, at ítróttur er ymiskur og at munur er á teimum krøvum, ið ávikavist **breiddar- og úrvalslið** seta viðvíkjandi hentleikum og mongd av venjingartímum. Tryggja, at rakstur av hallum, vøllum og øðrum kørmum um frítíðar- og ítróttavirksemi verður hildin við líka og uppfyllir tey krøv, ið liva upp til endamálið við nýtsluni.

3. Nøktandi hølisumstøður eiga at verða funnar til ymiskt frítíðarvirksemi, og verandi karmar eiga somuleiðis at verða útbygdir við endamálinum at **nøkta tørv**, ið er galdandi yvir longri tíðarskeið. Meginreglan um deilda nýtslu av hølum og hentleikum er berandi virði.

4. Í skipan av størri økjum eigur fyrilit at vera fyri útbygging av kørmum og **hentleikum** innan rørslu, frítíð og ítrótt, ið tænir einum so fjølbroyttum frítíðar- og ítróttavirksemi sum møguligt og tryggjar **tilgongd** til ymisk feløg og felagsskapir. Í sambandi við nýbygging av hallum og hølum eigur støða at verða tikin til, hvør skal kunna brúka hentleikarnar. Hjáhøli til **tænastur** so sum fysioterapi ella líknandi skal umhugsast, og hugsað eigur at verða um bæði tey íðkandi og áskoðarar.

5. Tryggja góðar virkisumstøður hjá børnum og ungum á tí stigi, ið hóskar til teirra, í samsvari við **ST barnarættindasáttmálan**. Kommunan eigur í samstarvi við ÍSF og kvøldskúlaskipanina at **skipa fyri**, at feløg og felagsskapir hava møguleika fyri fakligari menning á sínum virkisøki.

# ÍTRÓTTAANLEGG

Tað eru hópatals ítrótta- og frítíðarfeløg í Tórshavnar kommunu, og **uppgávan** hjá kommununi er at veita karmar, umstøður og hentleikar til hesi at útinna sítt virksemi. **Eftirspurningurin** eftir kørmum og hølisumstøðum til alsamt nýggj áhugamál er stórur. Vaksandi virksemi merkir eisini vaksandi trýst á **at veita umstøður**. Hentleikar til fleiri ítróttagreinar eiga at vera í teimum flestu hallunum. Tað kemur fyri, at ávísar ítróttagreinar einans hava umstøður at venja á einum og sama stað, og til hetta eiga einfaldar **loysnir** at finnast. Fyrireikingar og menning av kørmunum hjá Ítróttaanleggum til Oyggjaleikir **verða eisini raðfest komandi árini**. Verandi karmar til úrvalsítrótt verða mentir í tann mun, tað kann vera ítróttaliga mennandi, og sum liður í at hava ítróttaanlegg, ið lúka altjóða kappingarkrøv.





# KVØLDSKÚLASKIPANIN

Kvøldskúlaskipanin veitir karmar og **fjølbroytt** frítíðarvirksemi til eina breiða fjøld av borgarum, samstundis sum hugaítróttur[1] í ávísan mun rúmast innan **karmar** hjá kommununi. **Virksemið** hjá Kvøldskúlanum fevnir m.a. um frítíðarundirvísing, undirvísing fyri tvey ættarlið og førleikagevandi skeið. Farnu árini er **virksemið** hjá Kvøldskúlanum alsamt **vaksið**, og við støði í hesum verða innihald og skipan av Kvøldskúlanum endurskoðað og dagførd.

[1] Hugaítróttur er talv og bridge.




# UMSTØÐUR OG ÆTLANIR

Tá bústaðarøki vaksa, merkist hetta í lokala samfelagnum, ið mangan merkir tørvin at **víðka** um sítt **ítrótta- ella felagsskapsvirksemi**.

Kommunan skal við sínum bústaðar- og økisætlanum **tryggja**, at tá ætlanir fyri øki verða gjørdar og framdar í verki, eigur hetta at verða endurspeglað í teimum kørmum, ið eru í økinum.

Kommunan vil stremba eftir, at skipan av økjum hevur fyrilit fyri at **menna eitt fjøltáttað** umhvørvi við atliti til útbygging av øðrum virksemi innan **frítíð, ítrótt og rørslu soleiðis**, at karmarnir skapa fjølbroytni og tilgongd til ymiskt virksemi. Tórshavnar kommuna hevur yvirtikið **raksturin** á fleiri av verandi hallum og hevur bygt og umvælt nýggjar hallir. Kommunuætlanin ger **eina neyvari lýsing** av hesum umstøðum.




# HØLISUMSTØÐUR OG DEILD NÝTSLA

Tað er ein avbjóðing at hýsa teimum mongu frítíðarfelagsskapunum í kommununi, og leingi hevur verið arbeitt við ymsum staðsetingum og hølum til ymsar frítíðarfelagsskapir. Í hesum høpi er deild nýtsla av kommunalum hølum ein loysn.

**Samstarvsavtalur** kunnu verða gjørdar millum skúlar og felagsskapir, ið innibera deilda nýtslu av hølum og hentleikum – hesin møguleikin **kann økja um atgongd** til møgulig tøk skúlahøli og møguleikan at vera virkin saman. Ein ætlan eigur at verða løgd fyri, **hvørji øki í kommununi** skulu hava felagshøli ella karmar til fjølbroytt virksemi á sama matrikli.

Avbjóðingar kunnu tó vera við **deildari nýtslu** vegna rakstur, trygd, reingerð, planlegging og ábyrgd. Ein royndarverkætlan eigur at verða sett í verk við at seta eitt brúkararáð, har umboð fyri alt **frítíðarvirksemið**, ið húsast í einum ávísum bygningi ella skúla, møtist við avvarðandi leiðslu hvørt hálva ár fyri at tryggja lokalt og gott samskifti og felagsábyrgd. Ætlan skal gerast fyri økið frítíð, mentan og ítrótt, har ítøkilig mál og staðsetingar verða viðgjørd.



# RØRSLA OG TRIVNAÐUR Í BÝARRÚMINUM OG NÁTTÚRUØKJUM

Fólk brúka nógv **náttúruna og gøtuskipanir** at vera virkin í. Býur og náttúra eru góð umhvørvi og **karmar** fyri frítíðarvirksemi, og í komandi kommunuætlanini verður miðvís ráðlegging gjørd viðvíkjandi **hentleikum** til frítíð, ítrótt og rørslu. Arbeitt verður m.a. við eini samanhangandi gøtuskipan kring býin í Havn og millum býlingar og býarpartar. Ein stórur **fyrimunur** við gøtuskipanunum er, at tær rúma nógvari og ymiskari ferðing. Íløgur í súkklubreytir verða somuleiðis gjørdar í sambandi við arbeiðsætlanina um Tórshavn sum súkklubýur, umframt hetta verður víst til frílendisætlanir í kommunuætlanini. Hetta er alt partur av framhaldandi **menning og skipan** av nýggjum kørmum, ið skulu eggja til rørslu og útilív.

**Havast skal í huga**, at onkrar gøtuskipanir, t.d. í Havnardali, verða brúktar bæði av gongufólki og reiðfólki. Atferðarviðurskifti eiga at verða skipað á slíkum støðum.





# GÓÐAR VIRKISUMSTØÐUR HJÁ BØRNUM OG UNGUM Á TÍ STIGI, IÐ HÓSKAR TIL TEIRRA

Fjølbroytt tilboð eru í Tórshavnar kommunu innan mentan, frítíð og rørslu, ið **stimbra** kropsliga og sálarliga heilsu hjá børnum. Feløg og felagsskapir eiga at arbeiða sambært **ST sáttmálanum** um barnarættindi, sum m.a. merkir, at børn hava rætt til ávirkan, **mismunur** skal ikki verða gjørdur á børnum og eitthvørt barn hevur rætt til menning. Eisini eiga øll børn og ung at hava møguleika at **luttaka** í ítróttaligum- og felagsskapsvirksemi. Endamálið við frítíðar- og ítróttavirksemi fyri børn eigur at vera at geva børnunum eina góða byrjan og menning. Mark er fyri, hvussu nógv børn eiga at venja – og tað er eisini umráðandi, at umhvørvið, sum tey venja í, er gott. Tí eigur **menning** av venjara- og leiðaravirksemi innan ítrótt og frítíð fyri børn og ung at verða raðfest.

Strembað eigur at verða eftir, at tað eru skikkaði vaksin, sum venja barna- og ungdómslið. Samskifti við børn er umráðandi, og tað eigur at verða tryggjað, at **barnarættindini** verða yvirhildin innan teir karmar, kommunan veitir. Í ítrótti er vert at hava í huga, **at rørsla** er annað enn kapping – rørsla er motorikkur og felagsskapur. Skeið eiga at verða hildin fyri **venjarum** og feløgum innan barna- og ungdómsmenning, samskifti og samstarv, og eiga at verða skipað við denti á sálarliga og kropsliga heilsu hjá børnum og ungum. Fyri at tryggja, at børn og ung hava bestu **umstøður** at trívast, vil kommunan eggja feløgum til at taka venjaraskeið hjá ÍSF. Samstarv eigur at verða gjørt við kvøldskúlaskipanina viðvíkjandi førleikamennandi skeiðum til leiðarar og tey, sum hava ábyrgd av børnum og ungum innan frítíðarvirksemi, ið ikki er ítróttur.

# FYRIBYRGING AV HAPPING, DOPING, PÆDOFILI, ROYKING, RÚSDREKKA, RÚSEVNUM O.Ø.

Kommunan vil viðvirka til ein heilsufremjandi og fyribyrgjandi politikk við at seta forboð á ávísum økjum. Tískil eigur at verða **gjørt greitt** og krøv sett til, hvørjar reglur og hvørjar mannagongdir eru galdandi viðvíkjandi **fyribyrging** av doping, pædofili, royking, rúsdrekka og rúsevnum í teimum einstøku **feløgunum og felagsskapunum**, ið brúka kommunalu hentleikarnar, og í almenna rúminum sum heild. Mælt verður til, at feløg og felagsskapir hava leiðreglur ella politikk á økinum, **sum viðvíkur** m.a. happing, pædofili, misnýtslu, hóttanum og harðskapi. Víst verður til faldarar og leiðreglur á heimasíðuni hjá ÍSF.

ST barnarættindasáttmálin hevur somuleiðis áseting um, at hóskandi tiltøk skulu setast í verk til at **verja barnið** móti øllum sløgum av kropsligum ella sálarligum ágangi, skaða, misnýtslu ella harðskapi, m.a. kynsligari misnýtslu, meðan foreldrini, verjin ella onnur hava barnið undir hond. Verndartiltøk eiga í hóskandi mun at fevna um **munagóðar leiðreglur**, eins væl og um at búgva til virkisætlanir, sum kunnu veita **tann neyðuga** stuðulin til barnið og til teirra, sum hava barnið undir hond.



# STUĐULSSKIPANIR

Feløg og felagsskapir skulu hava góðar virkisumstøður við miðvísum gjøgnumskygdum stuðulsskipanum, ið stuðla undir endamálið við frítíðar- og ítróttapolitikkinum.





1. Gera eitt tilmæli um **eina endurskoðaða** stuðulsskipan, ið leggur dent á at stuðla børnum og ungum at vera virkin uttan mun til møguligar avbjóðingar og fíggjarligar umstøður.

2. Saman við teimum feløgum og felagsskapum, sum nýta hallir, vøllir og aðra kommunala ogn, kann ein **royndarverkætlan** við brúkararáði verða sett í verk fyri at tryggja tættari samskifti **millum brúkarar og politisku skipanina**. Ráðið kann virka sum ein ráðgevandi eind. Ráðið kann seta lokalt ítrótta- og frítíðarvirksemi á breddan við t.d. felagstiltøkum, temafundum og vitanardeiling.

3. Eggja til tað megnar sjálvbodna arbeiðið og nevndararbeiðið í feløgum og felagsskapum við eini **stuðulsskipan**, ið hevur fyrilit fyri umsitingarligari orku og dygd.

4. Seta grundleggjandi krøv viðvíkjandi dygd og umstøðum hjá børnum og ungum við miðvísum stuðulsskipanum. Mentamálanevndin setur á hvørjum ári upphædd av til ávíst stuðulsøki, m.a. við **endamálinum** at raðfesta og kveikja nýskapan innan mentan.



# GALDANDI STUÐULSSKIPANIR

Stuðulsskipanir **so sum ókeypis hallarleiga,** mentanarstuðul, rakstrarstuðul og íløgustuðul eru galdandi. Á **mentanarøkinum** hevur stuðul til barna- og ungdómsvirksemi í feløgum og felagsskapum **fingið hægri raðfesting** enn vaksnamannafelagsskapir. Stuðulin hevur verið latin sambært politiskari samtykt eftir umsókn frá feløgum og felagsskapum.





# HALLAR- OG HØLISSTUÐUL

Feløgini meta, at teirra virksemi er farið frá at vera hálvársítrótt ella vetrarítrótt til at vera heilársítrótt, og Býráðið hevur samtykt, at skipanin við **ókeypis hallarleigu frá 2020** at rokna skal fevna um stóran part av árinum. Broytingin hevur við sær, at so at siga øll hallarleiga hjá ítróttafeløgum og sersambondum verður ókeypis. Skipanin við ókeypis hallarleigu alt árið er ikki ætlað **sum eitt ískoyti** til ætlanir hjá feløgum um at kappast á hægri støði, tvs. fleiri tímar til verandi lið, men eigur at verða nýtt skynsamt í sambandi við planlegging av verandi **virksemi** og møguligum nýggjum virksemi til aðrar málbólkar, samsvarandi **endamálinum** við frítíðar- og ítróttapolitikkinum. Í hesum **sambandi** skulu verandi leiðreglur um **lán og brúk** av hallum og ókeypis hallarleigu endurskoðast og nýggj krøv setast.

Støða eigur samstundis at verða tikin til, um ein stuðulsskipan til rakstur av leigumálum hjá øðrum ítróttafeløgum og frítíðarfelagsskapum, ið ikki rúmast innan kommunalu karmarnar, skal setast í verk.

# EIN ENDURSKOÐAÐ STUÐULSSKIPAN, IÐ TEKUR ATLIT TIL AT STUÐLA ØLLUM BØRNUM OG UNGUM AT VERA VIRKIN

Ein skipan sum tann íslendska "Frístundakortið" tryggjar, at **øll børn og ung** fáa hvør sína upphædd um árið til lima- og luttøkugjald í skipaðum virksemi. Stuðulin skal fevna um **fjølbroytt** frítíðar- og ítróttavirksemi og kann vera viðvirkandi til, at enn fleiri børn og ung taka lut í sosialum felagsskapum og eru virkin í frítíðini.

Fyri feløg og felagsskapir merkir hetta, at minni orka verður brúkt til at innheinta limagjald, og tó er umsitingarlig orka neyðug í bæði kommununi og í feløgum og felagsskapum. Við eini **tílíkari skipan** fara krøv at verða sett stuðulsheimilaðu feløgunum og felagsskapunum m.a. um breidd og um førleikar hjá venjarum og leiðarum. Peningurin, ið feløg og felagsskapir fáa við stuðulsskipanini, eigur tískil at verða markaður beinleiðis til ungdómsarbeiði, at **førleikamenna venjarar** o.a. Íverksetan av hesi stuðulsskipanini í Tórshavnar kommunu krevur meirfígging og eitt fólk í starvi at fyrireika tilboðið, at seta tað í verk og at umsita tað. Virðir sum javnbjóðis møguleikar og inklusión eiga at verða **endurspeglað** í teimum átøkum ella skipanum, ið kommunan hevur í hyggju at **seta í verk**, og eggjar samstundis til, at feløg og felagsskapir taka sosial atlit.



# STIMBRA SJÁLVBOÐIÐ ARBEIÐI

Tórshavnar kommuna ynskir at styðja eitt virkið sjálvboðið felagsvirksemi. Kjarnin í **virknu** feløgunum og felagsskapunum er tey sjálvbodnu. Nevndararbeiðið í feløgunum er umráðandi liður í rakstrinum, og tað er eyðsæð, at feløg og felagsskapir, sum hava stóran umsetning, **hava ávísan tørv** á stuðli til rakstur. Endamálið eigur at vera at styrkja ta sjálvbodnu arbeiðsmegina og nevndararbeiðið í feløgum og felagsskapum, ið ikki skulu hugsavna seg um **umsitingarligt arbeiði** – hesum kunnu vit stuðla við miðvísum stuðulsskipanum. Kommunan vil **eggja teimum feløgum**, ið megna tað innan sín rakstur, at seta ein samskipara.


ver
mitt í
verðini

# GRUNDLEGGJANDI KRØV VERÐA SETT FELØGUM OG FELAGSSKAPUM TIL DYGD OG UMSTØÐUR HJÁ BØRNUM OG UNGUM

Tað er stórur partur av ungum borgarum, ið dagliga eru virknir **innan teir karmar**, kommunan veitir. Tískil verður tað mett skynsamt, at krøv verða sett til umstøðurnar hjá m.a. børnum og ungum, ið njóta gott av fjølbroyttu tilboðunum her At fremja hetta eiga **grundleggjandi** krøv at verða sett til førleikar hjá venjarum og leiðarum innan barna- og ungdómsarbeiðið í teimum feløgum og felagsskapum, sum kommunan veitir hølir og hentleikar til. Soleiðis kann dygdin av ungdómsarbeiðinum mennast, eisini vísandi til fleiri av omanfyristandandi lýsingum.

Krav eigur somuleiðis at vera sett um, at allir virknir limir fáa javnbjóðis tilboð, tvs. at fyri sama limagjald fært tú somu møguleikar og tilboð, hvat viðvíkur **dygdargóðum tilboði og førleikum** hjá venjarum ella leiðarum. Strembað verður eftir at samstarva við kvøldskúlaskipanina um førleikamennandi skeið.





TÓRSHAVNAR KOMMUNA

NUDLAVIRKIÐ